# Ráðstevna um trivnað hjá børnum

Fríggja– og leygardagin verður ein stór ráðstevna um trivnað hjá børnum hildin í Norðurlandahúsinum.

Ráðstevnan er fyri pedagogar og lærarar, og áhugin má sigast at vera sera stórur. Pláss er nevniliga fyri 400 luttakarum og ráðstevnan er fullteknað. Sum skilst, eru tað eisini fleiri enn 200 fólk, ið ynsktu at sleppa við, men sum vóru ov sein á sjóvarfallinum.

Á ráðstevnuni verða m.a. workshops og fyrilestrar á skránni. Millum fyrilestrahaldararnar vera nakrir føroyskir pedagogar og eisini víðagitnu Erik Siegsgaard og Margrethe Brun Hansen fara at leggja fram.

Sosialurin hevur tosað við Margrethe Brun Hansen, sum er útbúgvin pedagogur og sálarfrøðingur.

**eys**



## Teistin siglir kortini um kvøldið

Strandfaraskip Landsins boðaðu hósdagin frá, at kvøldtúrurin hjá Teistanum verður uppafturtikin

Hetta verður sagt í tíðindaskrivi, sum Strandferðslan sendi út seinnapartin.

Sagt verður, at Strandferðslan saman við manningini á Teistanum hava funnið eina fyribils loysn, og at fyrsti nýggi kvøldtúrurin varð sigldur longu hóskvøldið.

Fyribils hava partarnir avtalað at koyra eftir nýggja leistinum í tvær vikur, og á Strandferðsluni vóna tey at hava funnið eina endaliga loysn til ta tíð.

**-jm**

www.sansir.fo

Skrivstovulærlingur

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Føroya Arbeiðsgevarafelag sóknast eftir einum skrivstovulærlingi til umsitingina í Vinnuhúsinum.

Sum lærlingur hjá okkum kemur tú at fáa nógvar spennandi uppgávur. Okkara dagliga arbeiði er alt frá vanligum skrivstovuarbeiði, samskifti við limir og viðskiftafólk, til at svara spurningum og ráðgeva limum um arbeiðsmarknar- og vinnuviðurskifti.

Vit vænta, at tú:
- hevur miðnámsútbúgving t.d. hægri handilsskúla ella studentsprógv
- hevur góð samstarvsevnir
- dugur væl at samskifta á føroyskum
- hevur hollan telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Løn sambært sáttmála millum S & K og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn kann sendast til Føroya Arbeiðsgevarafelag ella á okkara teldupost adressu.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan ella Elsebeth á tlf. 311864.

Síðsta freist at senda umsóknina inn er 30. septembur.

Vinnuhúsið
R. C. Effersøesgøta 30
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311864, Fax 317278
teldupost: industry@industry.fo

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 15 vinnufeløgum. Í løtuni starvast 5 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn
Tel 31 18 64, Fax 31 72 78
industry@industry.fo, www.industry.fo



Ov seint at spola aftur...

Her er afturparturin á stjóranum, Heina. Tad eydnadist Heina at sleppa undan (á)ganginum á skrivstovuni, men harvid hoyrdi hann heldur ikki ávaringina um nýmáladu hurdina. Heini er framvegis ein ímynd av, at tad hevdi loyst seg hjá honum at fingid sær og starvsfólkunum røttu trygdina alt fyri eitt.

Føroya Lívstrygging kann bjóða eina trygd, id júst er grundad á avtalu millum leidslu og starvsfólk. Skipanin eitur Virkiseftirløn og er ein skræddaraseymad loysn vid bædi trygging og eftirløn.

Virkiseftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Virkiseftirløn er grundað á, at ein partur av lønini verður goldin inn í skipanina.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, ræður starvsfólkið sjálvt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

REPROZ

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo
Føroya Lívstrygging



Barnagarðsbørn frá sjeytiárunum:

# Fleiri foreldur eru ódugnalig

**Tað eru tvey sløg av umsorgan, sjónliga umsorganin, so sum matur og klæði, og ósjónliga umsorganin, so sum kærleiki, forstáilsi og samrøður. – Seta vit ikki fokus á ósjónligu umsorganina, bæði heima og í barnagørðunum fáa vit skjótt ein kaldan heim, sigur Margrethe Brun Hansen, pedagogur og sálarfrøðingur**



*Nógv børn vórðu í 70'unum tvingað at tilpassa seg í barnagarðinum, og nú tey sjálvi eru vorðin foreldur, duga tey ógvuliga illa at uppala síni børn, sigur Margrethe Brun Hansen, pedagogur og sálarfrøðingur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMRØÐA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Einki ættarlið megnar foreldraleiklutin til fullnar. Øll ættarliðini hava sínar góðu og sínar vánaligu síður, men tær síðurnar skifta, sum ættarliðini fara, greiðir Margrethe Brun Hansen frá.

Hon sigur, at fylgjurnar av barnagarðsuppvøkstrinum, sum byrjaði í 70'unum, nú koma til sjóndar, við eini rúgvu av ódugnaligum foreldrum.

– Vit eru noydd at royna at fanga trupulleikarnar beinanvegin, meðan børnini enn eru smá, tí teir kunnu fáa stórar fylgjur í framtíðini, heldur hon.

### Tænastuforeldrini

Hon sigur, at barnagarðsuppvøksturin hevur elvt til tvey sløg av nýggjum foreldratypum, umframt vanligu, góðu foreldrini. Aðra foreldratypuna nevnir Margrethe Brun Hansen fyri »tænastuforeldrini«.

Tað eru tey, ið fara við barninum, sum um tað var kongur.

– Foreldrini hava ilt við at taka konfliktir við barnið, og tora tí ikki at siga nei. Tey vilja so gjarna, at tann tíðin sum tey hava saman við barninum, skal vera so góð sum gjørligt, og tí fær barnið sín vilja í øllum. Men barnið má hava avmarkingar, sigur Margrethe Brun Hansen.

Hon sigur, at hesi foreldrini so ógvuliga fegin vilja nøkta tørvin hjá barninum, og tað er jú gott. Men tann grova villan, sum tey gera er, at tey lata barnið sjálvt definera sín tørv. Og tað megnar eitt barnagarðsbarn heilt einfalt ikki, sigur hon.

Barninum tørvar, at foreldrini taka leiðsluna. Tey tola ikki at spæla upp ímóti foreldrunum, uttan at fáa nakað aftur ímóti.

– Við hesum uppvøkstrinum, verður tað aktiva barnið sjálvsøkið, uttan respekt og uttan evni at liva seg inn í støðuna hjá øðrum. Vit kenna øll tey børnini, sum vit halda vera óuppdrigdnar lortungar. Tey, sum ikki duga at taka fyrilit fyri øðrum enn sær sjálvum, sigur Margrethe Brun Hansen. – Tey eru eitt úrslit av hesum uppvøkstinum.

– Viðkvæma barnið, harafturímóti, verður bangið og ótrygt, tí tað megnar ikki, at foreldrini allatíðina leggja ábyrgdina á tað. Tí tørvar, at foreldrini seta nakrar fastar rammur upp, og tala at, um barnið fer út um settu rammurnar. Gera tey ikki tað, verður barnið ofta mjarrut og óstøðugt, greiðir Margrethe frá.

### Fyriskipandi foreldrini

Hitt slagið av foreldrum, sum so eisini eru heilt í hinum endanum, eru »fyriskipandi foreldrini«.

Tað eru tey, ið vilja alt tað besta fyri barnið, og sum tí, áðrenn barnið yvirhøvur er føtt, hava kortlagt alt lívið hjá barninum. Tey eru allatíðina eitt fet frammanfyri barnið, uttan at hyggja at hvør tørvurin veruliga er.

– Tað eru ofta tey, ið lesa allar hugsandi bøkur um børn, fyri at gera alt so rætt sum gjørligt. Men tey hyggja ongantíð at barninum, og vita, um tað, tey lesa, snýr seg um júst teirra barn, sigur Margretha Brun Hansen.

Hon sigur, at hesi børnini ofta verða ein sýnisgluggi fyri umheimin, so øll hini kunnu síggja, hvussu væl foreldrini klára seg. Tað besta fyri børnini er tað, sum ljóðar gott og sum sær gott út. Eingin spyr eftir tørvinum hjá barninum.

– Sjónliga umsorganin er har, kanska í yvirmát, tí børnunum mangla absolut einki, reint fysiskt. Tað, tey hava, er aloftast eisini tað besta av tí besta. Men ósjónliga umsorganin er ikki til. Eingin setur seg niður at práta við hesi børnini, og spyr tey um hvat tey halda og ynskja, sigur Margrethe Brun Hansen

– Hesi børnini fara tí ógvuliga langt fyri at gera tey vaksnu nøgd. Tey eru von við, at bert um tey klára seg væl, kunnu tey verða elskað. Og tí broytast tey. Tey eru ikki vanlig børn, tí hungurin eftir at verða góðtikin yvirdoyvir alt annað, sigur hon.

Margrethe nevnir, at hetta eru tey børnini, sum koma yvir at vísa tær, at tey hava vaskað hendur, áðrenn tú hevur biðið tey, so at tú kanst siga teimum hvussu røsk og góð tey eru.

Hon heldur fram og sigur, at tey lívligu, sterku børnini duga at venda vreiðini úteftir. Tey gera ofta uppreistur, tá tey gerast eldri.

– Tey flyta sum oftast út sera ung, klippa hol í buksurnar og raka hárið av sær. Tey viðkvomu børnini megna tó ikki at venda vreiðini út. Ístaðin verður hon vend inneftir. Tey børnini hava tað veruliga ringt, eisini tá tey gerast vaksin, staðfestir Margrethe Brun Hansen.

### Handlið nú

»Vís mær tíni foreldur, og eg skal siga tær hvussu tú er«, stendur í innganginum í eini av bókunum hjá Margrethe Brun Hansen. Tað hevur hon skrivað, tí vit, í ógvuliga stóran mun, eru ein úrdráttur av foreldrunum.

– Hesi ódugnaligu foreldrini bera tó ikki skyldina fyri teirra ódugnaskap einsamøll. Tey eru jú sjálvi eitt úrslit av einum uppvøkstrið og einum uppdragilsi. Men um tey ikki verða gjørd varðug við trupulleikan, er eingin møguleiki at rætta hann, staðfestir Margrethe Brun Møller.

Hon heldur tí, at pedagogarnir mugu hava eitt vakið eyga yvir børnunum, og royna at eftirlíka og uppfylla tørvin hjá einstaka barninum.

– Størsti trupulleikin er vantandi ósjónliga umsorganin. Um pedagogarnir leggja seg eftir at geva hana, har hon vantar, er longu nógv vunnið. Ístaðin fyri at skelda óargaungan, ber til at spyrja hví hann man vera, sum hann er. Og ístaðin fyri at kúsja friðaliga barnið út at tuska og røra seg, ber til at seta seg við tí, og lesa eina søgu ella práta við tað, sigur hon.

Í sínum arbeiði, sum barnapsykolog, sær hon eina vaksandi mongd at stressaðum børnum. Hon sær nógv børn, sum ikki fáa loyvi at vera børn, tí tey allatíðina skulu liva upp til eitt ansvar, sum tey ikki megna. Antin við sjálvi at skula taka avgerðir, ella við at skula liva upp til tær avgerðir, sum longu er tiknar teirra vegna.

– Tey góðu foreldrini taka avgerðir saman við barninum. Tey hyggja at hvussu barnið hevur tað júst tann dagin, og so verður avgerð tikin út frá tí. Tey góðu foreldrini halda fast um, at tey eru tey vaksnu og børnini eru børn, sigur hon.

Margrethe Brun Hansen slær fast, at um vit ikki taka hendan trupulleikan í álvara, og arbeiða saman, bæði foreldur og pedagogar, so verður heimurin skjótt eitt kalt stað at vera.

– Vit mugu taka ósjónligu umsorganina og prioritera hana nógv meiri, enn hon verður í dag. Geva okkum tíð til at síggja, lesa og hoyra børnini. Soleiðis, at vit við næsta ættarliði fáa nøkur dugnalig foreldur, sigur Margrethe Brun Hansen at enda.

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN



KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

**Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!**

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

**Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur.** Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

**Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur.** Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452